# HVØNN BIL?



Kristina hevur akkurát fingið koyrikort og ætlar at keypa sær sín fyrsta bil.

Tabellin niðanfyri hevur upplýsingar um fýra bilar, sum hon finnur hjá bilasøluni.

| **Modell:** | **Alpha** | **Bolte** | **Castel** | **Dezal** |
|---|---|---|---|---|
| **Ár** | 2003 | 2000 | 2001 | 1999 |
| **Lýsingarprísur (zed)** | 4800 | 4450 | 4250 | 3990 |
| **Koyrdir kilometrar** | 105 000 | 115 000 | 128 000 | 109 000 |
| **Motorstødd (litrar)** | 1,79 | 1,796 | 1,82 | 1,783 |

## Spurningur 1: HVØNN BIL?

*PM985Q01*

Kristina vil hava ein bil, sum lýkur **allar** hesar treytir:

- Hevur **ikki** koyrt meiri enn 120 000 kilometrar.
- Varð framleiddur í ár 2000 ella eitt seinni ár.
- Lýsingarprísurin er **ikki** meiri enn 4500 zed.

Hvør bilur lýkur treytirnar hjá Kristinu?

A Alpha
B Bolte
C Castel
D Dezal

## Spurningur 2: HVØNN BIL?

*PM985Q02*

Hvør bilur hevur minst motorstødd?

A Alpha
B Bolte
C Castel
D Dezal

## Spurningur 3: HVØNN BIL?

PM985Q03 – 0 1 9

Kristina skal gjalda 2,5% av lýsingarprísinum eyka í skatti.

Hvussu nógv skal Kristina gjalda eyka í skatti fyri Alpha modellið?

Eykaskattur í zed: ..................................